## Serstøk frívika til útgjald - skráseting í Lønargreiðsluni

Tá ið serstøk frívika verður goldin út, skal tað verða skrásett í serligari umbøn í Lønargreiðsluni. Umbønin liggur undir **BROYTINGAR**




Umbønin eitur **Serstøk frívika útgjald**



Teigarnir í skrásetingarmyndini, sum skulu vera fyltir út, eru stovnur, løntakari og starvið, sum útgjaldast skal fyri.




Í frágreiðingarteigin skal verða skrivað, hvussu nógv skal verða goldið út - øll vikan ella partur av henni. Eisini skal verða skrivað, hvat innvinningarárið er.

Skulu serstakar frívikur verða goldnar út fyri fleiri ár, skal eisini verða viðmerkt, hvussu nógv talan er um hvørt árið.

Avtalan um serstøku frívikuna er at finna her.

Í 7. parti í avtaluni standa ásetingar um útgjald av serstøku frívikuni.

Hava tit spurningar, ella eru ivamál, eru tit vælkomin at venda tykkum til lønarskrivstovuna á Gjaldstovuni.